# Útistova vitjaði Sosialin

## Týsdagin fekk lokalredaktiónin hjá Sosialinum í Klaksvík óvæntaða vitjan

VITJAN

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Mangan fær Sosialurin á Argjum vitjan av til dømis skúlaflokkum ella øðrum ungum, sum vilja síggja, hvussu arbeitt verður á einum blaði. Men ein dagin fyrr í vikuni fekk lokalredaktiónin hjá Sosialinum í Klaksvík vitjan av nøkrum sera fittum børnum, sum ganga í útibarnagarði úti í Grøv.

Tá dyrnar til redaktiónina í Klaksvík fór upp týsmorgunin, og komu ikki færri enn 13 børn í aldrinum fimm og seks ár inn. Tey greiddu frá, at tey vóru á veg norður á Kósina at vita, um tey ikki fóru at finna onkrar ommur, sum vóru til arbeiðis.

– Vit skulu eisini eta matpakka á Kósini, greiddi ein genta stórsmílandi frá.

Hóast tað regnaði eitt sindur hendan dagin og var nakað kalt, so lat tað ikki til, at børnini í Útistovu løgdu nakað í tað. Tey vóru væl ílatin og gingu hvør við sínari tasku á rygginum við mateskju í.

Sólgerð og Hervør, sum arbeiða í Útistovu søgdu, at tey ofta fara á vitjan á ymsum arbeiðsplássum.

– Tað dámar børnunum sera væl, og serliga tá vit vitja arbeiðspláss hjá onkrum av foreldrunum, greiddu tær frá.

Tey steðgaðu ikki longi á redaktiónini, men tey vóru sera hugtikin av lítla postkassanum, sum stóð uttanfyri. Og glað vóru tey fyri at fáa hann við á myndina.

Síðani gekk leiðin hjá teimum víðari til Kósavirkið og Mylnuhúsið, sum Útistova er ein partur av. Har vórðu tey so, til foreldrini komu eftir teimum aftaná arbeiðstíð.




*Steffan Arthur, Tanja, Jancy, John Sigurd, Astrid, Tóra Mohr, Mari, Súsanna, Fróði, Tóra Matras, Erik, Petur Martin og Kristina stukku inn á gólvið á Sosialinum í Klaksvík seinasta týsmorgun. Sólgerð stendur í hurðini*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og sirm ella mjørki av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin milum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og suðri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og vestri og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 16 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 25 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 30 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 985 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani fer um Føroyar hóskvøldið. Eitt annað lágtrýst, 989 hPa. sunnan fyri Hvarvið á 50N-40V fer í landnyrðing og dýpist.




Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarnáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/09 kl. $06^{00}$–30/09. $06^{00}$. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 29/09 kl. $06^{00}$–30/09 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í september: 195,1 mm

## Morgunlestrar
**4.–9. oktober**

***Jógvan Fríðriksson, prestur, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 4. oktober:**
nr. 581 Stýr míni skútu í ódn og logn
1. Kor. 1,18
nr. 582 Lov og tøkk eg tær fram beri

**Týsdagin 5. oktober:**
nr. 580 Slættasti sjógvur og brattastu bylgjur
1. Kor. 1,17

**Mikudagin 6. oktober:**
nr. 584 Eg sigla man yvir lívsins hav
1. Kor. 1,23 & 24

**Hósdagin 7. oktober:**
nr. 579 Guð signi várt fólk, har tað siglir og rør
1. Kor. 1,21

**Fríggjadagin 8. oktober:**
nr. 578 Nú byrja vit í Jesu navn
1. Kor. 1,19
nr. 583 Mín bátur er lítil, títt hav er so stórt

**Leygardagin 9. oktober:**
nr. 588 Boðar tú til allar tjóðir
1. Kor. 1,25
nr. 339 Heimsins børn so mangan stað

## VESTFALLSKYRRINDI

22. sept.: Mánin næstur jørðini
28. sept.: Fullmáni
5. okt.: Mánin longst frá jørðini
6. okt.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 1. okt | 09.18 | 21.40 | 08.18 | 20.40 | 08.33 | 20.55 | 11.18 | 23.40 | — | 12.18 | 07.33 | 19.55 | 06.33 | 18.55 | 09.33 | 21.55 | 10.33 | 22.55 | 09.03 | 21.25 | 10.18 | 22.40 |
| 2. okt | 10.02 | 22.24 | 09.02 | 21.24 | 09.17 | 21.39 | — | 12.02 | 00.40 | 13.02 | 08.17 | 20.39 | 07.17 | 19.39 | 10.17 | 22.39 | 11.17 | 23.39 | 09.47 | 22.09 | 11.02 | 23.24 |
| 3. okt | 10.47 | 23.12 | 09.47 | 22.12 | 10.02 | 22.27 | 00.24 | 12.47 | 01.24 | 13.47 | 09.02 | 21.27 | 08.02 | 20.27 | 11.02 | 23.27 | — | 12.02 | 10.32 | 22.57 | 11.47 | — |
| 4. okt | 11.37 | — | 10.37 | 23.02 | 10.52 | 23.17 | 01.12 | 13.37 | 02.12 | 14.37 | 09.52 | 22.17 | 08.52 | 21.17 | 11.52 | — | 00.27 | 12.52 | 11.22 | 23.47 | 00.12 | 12.37 |

5 707265 100050 >